TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 01.03.2021 kl. 19:00
**Málnr.:** 20/00367

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Jónleyg Jespersen Bech, Bjarni Hammer, Kristina Roest

Varalimir: Eyð Eidesgaard

Ikki møtt: Súsanna Bertholdsen, fráboðað

Viðmerking: Kristina Roest ynskir viðmerkt, at hon tekur ikki undir við skránni, punk 2. sum hon sigur ikki vera í samsvar við niðurstøðuna hjá kommunalaeftirlitinum

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 10/21 | 21/00181-1 | Býráðslimi berst frá at møta á býráðsfundi |
| 11/21 | 21/00001-2 | Dagføringar av Kommunustýrisskipani fyri Tvøroyrar kommunu |
| 12/21 | 20/00364-14 | Val av nevndarlimum -aðrar nevndir §30-34 samb. kommunustýrisskipan fyri Tvøroyrar kommunu -Umboðum til stýrið fyri BHS |
| 13/21 | 21/00020-1 | Føroya Eftirskúli -val av nevnd |
| **Til kunningar** | | |
| 3/21 | 20/00360-2 | Kommunulæknaviðtalan á Tvøroyri |
| 4/21 | 21/00035-1 | Skattatøl 2021 |
| | | |

Til støðutakan

**10/21**
**21/00181-1 Býráðslimi berst frá at møta á býráðsfundi**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 01.03.2021 | 10/21 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 01.03.2021)**
Súsanna Bertholdsen hevur fráboðað, at hon hevur forfall til býráðsfundin 1. Mars.2021, og at hon ynskir at varalimur fær fundarboð.

Samb. valúrslitinum av kommunuvalinum 10. november 2020, er tað Eyð Eidesgaard, sum er 1. varalimur hjá Javnaðarflokkinum.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin

- *§ 18. Berst kommunustýrislimi frá at møta á kommunustýrisfundi vegna heilsustøðu, kunnu teir limir, ið eru valdir á viðkomandi valevnislista, krevja, at tiltakslimur fær fundarboð.*
  - *Stk. 2. Berst kommunustýrislimi væntandi frá at røkja starv sítt í meira enn 14 samfullar dagar vegna annað alment starv, heilsustøðu ella aðra lógliga orsøk, skal viðkomandi boða borgarstjóranum frá, og borgarstjórin skal síðani geva tiltakslimi fundarboð.*
  - *Stk. 3. Kommunustýrið ger av, um treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi eru loknar.*

**Viðmerking til §18:** *Starvið sum kommunustýrislimur verður mett sum borgaraskylda. Hetta upprunastøðið er millum annað lógarfest í kommunalu vallógini um skylduna at taka við vali, um ein er valbærur. Ein kommunustýrislimur hevur sostatt skyldu at røkja starvið í virkiskeiðinum. Hetta merkir í fyrstu syftu, at kommunustýrislimur hevur skyldu at vera á kommunustýrisfundum og á teimum nevndarfundum, har hann er valdur sum nevndarlimur. Hóast kommunustýrislimur hevur møtiskyldu, er hon ikki treytaleys. Hetta sæst eisini í ásetingunum í stk. 1 og 2 um lógligt forfall. Lógin viðger ikki út í æsir, nær talan er um lógligt forfall, og hon tekur heldur ikki støðu til, hvussu langt møtiskyldan røkkur.*

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Samsýning til tiltakslimin

**Tilmælið:**
Býráðið verður at taka støðu til, um treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi eru loknar.

**Býráðið 01. marts 2021:**
Einmælt samtykt at Eyð Eidesgaard tekur sæti í býráðnum til fundin 1. mars 2021.

**11/21**
**21/00001-2 Dagføringar av Kommunustýrisskipani fyri Tvøroyrar kommunu**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 04.01.2021 | 2/21 |
| 2 Býráðið | 01.03.2021 | 11/21 |

**Málslýsing:**
**Kommunustjórin 01.01.2021**
Tvær greinar í kommunustýrisskipanin fyri Tvøroyrar kommunu, skulu dagførast.

**6. partur (Aðrar nevndir)**
Tvøroyrar býráð hevur einmælt samtykt við 2 viðgerðum, seinast hin 29.04.2020, at Fámjins kommuna verður partur av felags tilbúgvingini, saman við Hvalbiar kommunu og Tvøroyrar kommunu, og at Fámjins kommuna velur ein umboðandi lim í Tilbúgvingarnevndina, sum harvið verður viðkað frá 7 limum til 8 limur.

- *§32. Tilbúgvingarnevndin (verandi)*
    - *1. Petti. Tilbúgvingarnevndin hevur 7 limir. Í tilbúgvingarnevndini sita 3 limir, tilnevndir av Tvøroyrar Býráð og 1 limur, tilnevndur av Hvalbiar Bygdaráð.Tilbúgvingarleiðarin á Tvøroyri, sýslumaðurin og ein limur umboðandi Suðuroyar Norðara Bjargingarfelag (SNB) eru eisini limir í tilbúgvingarnevndini. Borgarstjórin á Tvøroyri er føddur formaður í tilbúgvingarnevndini. Harumframt velur Tvøroyrar Býráð 3 varalimir í tilbúgvingarnevndina.*

- *§32. Tilbúgvingarnevndin* ***(broytt)***
    - *1. Petti. Tilbúgvingarnevndin hevur 8 limir. Í tilbúgvingarnevndini sita 3 limir, tilnevndir av Tvøroyrar Býráð og 1 limur, tilnevndur av Hvalbiar Bygdaráð og ein limur tilnevndur av Fámjins Bygdaráð. Tilbúgvingarleiðarin á Tvøroyri, sýslumaðurin og ein limur umboðandi Suðuroyar Norðara Bjargingarfelag (SNB) eru eisini limir í tilbúgvingarnevndini. Borgarstjórin á Tvøroyri er føddur formaður í tilbúgvingarnevndini. Harumframt velur Tvøroyrar Býráð 3 varalimir í tilbúgvingarnevndina.*

Snaran -Tvøroyrar býráð hevur hin 14.06.2018 einmælt samtykt at avtaka sjálsognarstovnin Snaran, og ístaðin yvirtekur Tvøroyrar kommuna ognarskapin aftur av Snaruni og skipar virksemið í Snaruni.

- *§34 Aðrar nevndir, Snaran: (verandi)*
    - *Tvøroyrar býráð velur 2 limir og 2 varalimir*
- *§34, Aðrar nevndir, Snaran* ***(broytt)***
    - *Henda nevnd er avtikin*

**Tilmæli:**
Kommunustýrsiskipan fyri Tvøroyrar kommunu verður broytt samb. omanfyri nevndu samtyktir.

**Býráðið 04. januar 2021:**
Einmælt samtykt at broyta kommunustýrisskipanina.

**Býráðið 01. marts 2021:**
Einmælt samtykt

**12/21**

**20/00364-14 Val av nevndarlimum -aðrar nevndir §30-34 samb. kommunustýrisskipan fyri Tvøroyrar kommunu -Umboðum til stýrið fyri BHS**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 01.03.2021 | 12/21 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 23.02.2021)**
Borgarstjórin ynskir at skipa fyri valið av varalimi til stýrið fyri Bú- og heimatænastuna í Suðuroy BHS, samb.: Løgtingslóg nr. 20 frá 7. apríl 2014 um kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt v.m..

- *§ 7. Javnbjóðis samstarv inniber, at kommunurnar eru felags um at røkja heimatænastu, eldrarøkt v.m.. Kommunurnar velja eitt stýri at fyrisita nevnda øki. Í stýrið verða valdir í minsta lagi 5 limir. Hvør kommuna fær 1 lim og 1 varalim. Borgarstjórin er fyrstvaldi limurin. Í kommunum við fleiri enn 1 limi verða valdir 2 varalimir, fyrsti og annar varalimur. Varalimirnir verða valdir millum kommunustýrislimirnar.*
- *Stk. 2. Kommunur við oman fyri 1000 íbúgvum við ársbyrjan í valárinum fáa 1 lim afturat pr. 1000 íbúgvar. Hesir verða valdir millum kommunustýrislimirnar.*

Tvøroyri býráð hevur á fundi hin 4. Januar valdi umboð í stýrið fyri BHS:
- Jónleyg Jespersen Bech, sum fastur limur
- Anitu Vibergsdóttir, sum varalim

**Til støðutakan:**
Val av varalimi umboðandi Tvøroyrar kommunu í BHS samstarvinum

**Býráðið 01. marts 2021:**
Kristin Michelsen skjýtur upp, at Bjarni Hammer verður valdur til varalim
Fyri eru: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Jónleyg Bech
Ímóti: Kristina Roest
Blankt: Bjarni Hammer, Eyð Eidesgaard
Kristina Roest ynskir viðmerkt, at hon tekur ikki undir tilmælinum at velja eftir samb. Meirilutavalháttinum, men at tilmælið hjá kommunalaeftirlitinum verður fylgt

**13/21**
**21/00020-1 Føroya Eftirskúli -val av nevnd**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 28.01.2021 | 9/21 |
| 2 Býráðið | 01.03.2021 | 13/21 |

**Málslýsing:** Kommunustjórin 14.01.2021

Borgarstjórin hevur heitt á kommunustjóran um at seta á skrá til komandi býráðsfund, val av 5 limum í nevndina fyri Føroya Eftirskúla.

- *Málið var lagt fram á býráðsfundi 4. januar 2021, har samtykt var at útseta málið til næst komandi býráðsfund.*

Nevndin umboðar áhugabólkin, sum rekur skúlan, og hevur 2 umboðan í stýrinum fyri Eftirskúlan, samb. Løgtingslóg um eftirskúlar.

## Málsgongdin áðrenn

Tvøroyrar Býráði hevur samtykt hin 29.12.2018 at nevndin fyri Føroya Eftirskúla verður mannað við 5 limum, og umboðini vera:

- *Bjarni Hammer*
- *Mariann Mikkjalsdóttir*
- *2 umboð úr MMR, ið MMR sjálvt velur*
- *Jens Arni Hammerfoss Leo*
  - *Mentamálaráðið kunnar Tvøroyrar kommunu hin 28.05.2019, at MMR ongan lim hevur í nevndini fyri Føroya Eftirskúla.*
  - *Mentanarnevndin velur hin 2.12.2019, Cecilia Nólsøe Poulsen í nevndina fyri Eftirskúlan ístaðin fyri Marian Mikkjalsdóttir, sum fer úr nevndini.*

**Samb. heimasíðuni hjá Føroya Eftirskúla verður kunna um at:**

**Viðtøkurnar:**

*§ 6. Skúlastýrið hevur 5 limir:*

- *2 limir verða valdir í millum foreldur, ið hava børn í skúlanum.*
- *2 limir verða valdir av áhugabólkinum**
- *1 limur verður valdur av – og millum teirra – ið starvast í skúlanum.*
- *Stk. 2. Stýrislimirnir verða valdir fyri 2 ár í senn. Afturval er møguligt.*
- *Stk. 3. Eitt eykaumboð verður valt fyri hvønn av bólkunum í stk, 1 og 2.*
- *Stk. 4. Stýrið skipar seg sjálvt við formanni*

**Stýrið foreldra- og áhugabólkur***

*Ein áhugabólkur, sum er settur av Tvøroyrar Kommunu og einum foreldrabólki, sum er skipaður av foreldrum/verjum hjá næmingum á skúlanum. Hesir bólkar, saman við starvsfólkum á skúlanum skipa stýrið skúlans. -Stýrið skipar seg sjálvt við formanni*

- *Skúlastýrið hevur 6 limir:*
- *2 limir verða valdir í millum foreldur, ið hava børn í skúlanum.*
- *2 limir verða valdir av áhugabólkinum*
- *1 limur verður valdur av – og millum teirra – ið starvast í skúlanum.*
- *1 limur vegna næmingarnar í skúlanum.*
- *Stýrislimirnir verða valdir fyri 2 ár í senn. Afturval er møguligt.*
- *Eitt eykaumboð verður valt fyri hvønn av bólkunum.*

**Lógargrundarlag:**

- Løgtingslóg nr. 83 frá 17. mai 2000 um eftirskúlar,

**Tilmælið:**

Nevndarlimirnir umboðandi Tvøroyrar býráð verða valdir eftir lutfallsháttinum. Mælt verður til at nevndin skipar seg sjálv.

TVØROYRAR KOMMUNA

**Býráðið 28. januar 2021:**
Kristin Michelsen mælir til, at Tvøroyrar býráð biður um ein fund við Mentamálaráðið, fyri at hoyra hvønn leiklut Tvøroyrar kommuna hevur í Føroya Eftirskúla sum er, og hvønn leiklut Tvøroyrar kommuna kemur at hava framyvir í Føroya Eftirskúla.
**Einmælt samtykt.**

**Kommunustjórin 23.02.2021**
Í samb. við, at fráboða bleiv hin 12. feb, at landstýrismaðurin í mentamálum, saman við umboðum úr Mentamálaráðnum vitjaði í Suðuroynni henda sama dagin 12. feb. 2021, var av borgarstjóranum heitta á mentamálaráðið, um at vitja á Tvøroyrar kommunu, nú kortini var vitja í Suðuroynni.
Innbjóðing bleiv tí sent til til allar býráðslimir við stuttum skotbráið, at fundur bleiv í býráðssalimum, at viðgerða og hoyra um Føroya Eftirskúla og Skjalasavnið. Eftir hetta var vitja á Føroya Eftirskúla og á Skjalasavninum.

Kommunustjórin hevur eftirfylgjandi býráðsfundin 28. Jan. samskift við nevndini fyri Føroya Eftirskúla, fyri at fáa greiðu á, hvørt nevndin fyri Føroya Eftirskúla, sum Tvøroyrar býráð hevur valt limir í, enn er virkin. (Tvøroyrar býráð valdir 3 persónum í nevndina fyri Føroya Eftirskúla 29.12.2018, og Tvøroyrar býráð hevur onga fráboðan fingið frá hesari nevndini, um at nevndin ikki er til longur)

Eisini hevur umsitingin heitt á nevndina fyri Føroya Eftirskúla fyri at fáa greiðu á niðanfyri:
1. **Sjávsognarstovnin -fyri Føroya Eftirskúla**
   a. Viðtøkur fyri Sjálsognarstovnin, og hvør situr í nevndini í Sjálsognarstovninum.
2. **Áhugabólkurin - fyri Føroya Eftirskúla**
   a. Viðtøkur fyri áhugabólkin, og hvør er situr í nevndini fyri áhugabólkin -(samb. §1. í viðtøkum fyri Føroya Eftirskúla "Skúlin varð stovnaður av áhugabólkinum fyri stovnan av Føroya eftirskúla á Tvøroyri og er settur á stovn sum sjálvsognarstovnur frá 13/03 2019 at rokna")
3. **Áhugafelagið –fyri Føroya Eftirskúla**
   a. Viðtøkur fyri áhugafelagið, og hvør er situr í nevndini fyri áhugafelagið -(í viðtøkunum fyri Føroya Eftirskúla stendur skriva, §4, stk. 2 "Áhugabólkurin er áhugafelagið fyri stovnan av Føroya Eftirskúla")

**Svari frá nevndini fyri Føroya Eftirskúla uppá omanfyri er at:**
1. Stýrið fyri Føroya Eftirskúla er manna við 2 limum úr áhugafelagnum, og eru hesir: Bjarni Hammer, Jens Arni Leo Hammerfoss. -Meðan áhugabólkurin er mannaður av: Bjarni Hammer, Jens Arni Leo Hammerfoss og Niels Rødgaard
2. Viðtøkunum fyri áhugabólkin, vera sendar seinni.
3. Nevndin fyri Sjálvsognarstovnin er stýrið fyri skúlan.

Upplýst verður eisini, at áhugabólkurin og áhugafelagið er tað sama, og áhugabólkurin er tann bólkur av persónum, sum eru úr áhugafelagnum - fyri Føroya Eftirskúla

**Tilmælið:**
Kommunustjórin mælir til, at Tvøroyrar býráð tekur støðu til, hvørt Tvøroyrar býráð framhaldandi skal velja limur í nevndina fyri Sjálsognarstovnin Føroya Eftirskúla, eins og var gjørt seinast hin 2. Des. 2019. Ella um Tvøroyrar býrða skal avtaka sína umboðan í nevndini fyri Sjálsognarstovnin Føroya Eftirskúla.

**Býráðið 01. marts 2021:**
Anita Vibergsdóttir mælir til at málið verður beint í Mentanarnevndina, einmælt samtykt.

**Til kunningar**

**3/21**
**20/00360-2 Kommunulæknaviðtalan á Tvøroyri**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 02.02.2021 | 4/21 |
| 2 Sosiala nevnd | 02.03.2021 | 1/21 |
| 3 Býráðið | 01.03.2021 | 3/21 |

**Málslýsing:**

**Kommunustjórin 05.12.2020**
Til umrøðu eru viðurskiftini á kommunulæknaviðtaluni á Tvøroyri, nú verandi kommunulæknin hevur sagt seg úr starvi komandi mars 2021.

**Sosiala nevnd, 8. december 2020, pkt. 6:**
Málið var kunna og umrøtt

**Kommunustjórin 26.01.2021**
Forkv. í Sosialunevnd ynskir at viðgerða støðuna viðv. kommunulæknunum.

**Sosiala nevnd 02. februar 2021:**
Einmælt samtykt at umsitingin heitur á heilsutryg um ein fund við Tvøroyrar kommunu.

**Býráðið 01. marts 2021:**
Málið var umrøtt og kunna.

**4/21**
**21/00035-1 Skattatøl 2021**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.01.2021 | 1/21 |
| 2 Býráðið | 28.01.2021 | 2/21 |
| 3 Fíggjarnevndin | 19.02.2021 | 2/21 |
| 4 Býráðið | 01.03.2021 | 4/21 |

**Málslýsing: Samanbering av skattainntøkum í 2021**

**Kommunustjórin 01.03.2021**

- Til kunningar/umrøðu eru samanberingar av skattainntøkum

**Býráðið 01. marts 2021:**
Málið var umrøtt og kunna.

Fundurin lokin kl. 19:30

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Alvi Mortensen

Jónleyg Jespersen Bech

Bjarni Hammer

Kristina Roest

Eyð Eidesgaard